# Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur



**§ 1 Endamál**

Endamálið við játtanini er at stuðla íløgur í bygging, sum ítróttafeløg og frítíðarfelagsskapir standa fyri.

**§ 2 Stuðul til íløgur**

Stk. 1. Stuðul kann verða latin til nýbygging, útbygging og umbygging av felagshølum, anleggum til ítrótt og annað frítíðarvirksemi og útgerð.

Stk. 2. Stuðul verður ikki latin til vanligt viðlíkahald.

**§ 3 Umsókn og treytir**

Stk. 1. Stuðul verður latin eftir umsókn, sum skal verða skrivað á serstakt umsóknarblað, sum kann heintast á heimasíðu kommununnar, har tað eisini verður lýst um stuðulsmøguleikan.

Stk. 2. Við umsóknini skal fylgja:

- a. Kostnaðarmeting við fíggingarætlan
- b. Tíðarætlan fyri byggingina
- c. Lýsing av byggiætlanini

Stk. 3. Stuðulin er í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum. Stuðulstilsøgn er harumframt treytað av:

- a. At játtan er tøk á fíggjarætlan kommununnar
- b. At umsøkjari hevur fingið til vega øll neyðug loyvi til byggingina
- c. At stuðul verður endurrindaður umsøkjaranum lutfalsliga fyri liðugt arbeiði, tó í mesta lagi upp til játtaðu stuðulsupphæddina
- d. At stuðulstilsøgnin er tíðavarmarkað til 3 ár

Stk. 4. Umsøkjari, sum hevur fingið stuðul, skal lata kommununi endaligan byggiroknskap í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at byggingin er liðug, til endaliga uppgerð fyri latnan stuðul.

Stk. 3. Stuðul verður ikki latin til bygging, sum er byrjað ella liðug.

**§ 4 Viðgerð og avgerð um stuðul**

Stk. 1. Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin gera tilmæli til mentamálanevndina, sum tekur avgerð samsvarandi krøvunum í hesi reglugerð.

Stk. 2. Mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at veita stuðul lægri enn kr. 300.000, tekur mentamálanevndin avgerð.

Stk. 3. Mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at veita stuðul hægri enn kr. 300.000, tekur býráðið við tilmæli frá fíggjarnevndini avgerð.

**§ 5 Aðrar treytir**

Stk. 1. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann býráðið víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð.

Stk. 2. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.